ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

23. apríl 2021
Mál: 21/06102-2
Tygara Skriv:
Viðgjørt: Barbara Álvsdóttir Thomsen

Nr. 52-117/2020

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um talulæru og bústovnatilboð til fólk við seinheilaskaða og demens settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Ætlar landsstýrismaðurin at seta í starv fleiri talulærarar, nú lógin um almanna trygd og tænastur (vælferðarlógin) er komin í gildi?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at eyðmerkja tørvin og samskipa útboðið við taluvenjingum og viðlíkahaldsvenjingum fyri fólk við seinheilaskaða og demens?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at veita fleiri bústovnatilboð til fólk við seinheilaskaða og demens?
4. Samskiftir landsstýrismaðurin við kommunala geiran um samstarv av tilboðum á økinum?

Viðmerkingar:
Fyri knøppum ári síðan hevði undirritaði ein líknandi grein 52 fyrispurning til landsstýrismannin um at fáa sett fleiri talulærarar í starv til tey, sum krevja áhaldandi talulæru.[1]

130 fólk verða rakt av seinheilaskaða hvørt ár. Fleiri av hesum missa samskiftisførleikan, men kunnu við venjingum vinna hann aftur. Fleiri vinna arbeiðsførleikan aftur, um viðlíkahaldsvenjingarnar halda fram eftir sjúkralegu. Samskiftisevnini eru grundarlagið undir einum virknum sosialum lívi. Á Landssjúkrahúsinum er eitt tilboð, har sjúklingar fáa uml. 10 taluvenjingartímar, men so steðgar tað har. Ofta noyðast avvarðandi at keypa talulæruhjálp, soleiðis at venjingin kann halda fram. Tað almenna veitir avmarkaða taluhjálp til fólk omanfyri 18 ár.

Avvarðandi at sjúklingum við seinheilaskaða og demens eru ofta fremsta hjálpin. Ein sjónvarpssending í KVF herfyri lýsti eisini ítøkiliga tørvin á økinum.[2]

Talulærarar verða brúktir innan onnur øki í almenna geiranum, men einamest til børn og ung. Fleiri útbúnir talulærarar eru klárir at taka við, um økið verður raðfest hægri og peningur játtaður á fíggjarlógini.

[1] https://www.logting.fo/mal/mal/?id=34
[2] https://kvf.fo/dokumentarurin?sid=122593

Tørvurin á bústovnatilboðum er eisini stórur. Her eru einstakar ítøkiligar ætlanir.

Óvist er tó, um øll í landinum fáa somu møguleikar, tá tað kemur til raðfesting av tilboðum.

Landsstýrismaðurin hevur lovað batar. Fyri at fáa greiðu á, hvat ítøkiligt er vorðið betri á hesum øki seinasta árið, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 13. apríl 2021

Jóhannis Joensen

Svar:

Til nr. 1

Sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur koma reglurnar um viðlíkahaldsvenjing í gildi 1. september í ár. Samstundis skal kunngerð gerast um viðlíkahaldsvenjing, og eru vit farin undir hetta arbeiðið. Tó er ikki ætlanin, at kunngerðin fer at áseta ávíst tal av talulærarum at seta í starv.

Harumframt er á fíggjarlógini fyri 2021 settar 2 mió.kr av til viðlíkahaldsvenjing. Ætlanin er at byrja at veita viðlíkahaldsvenjing til borgarar við seinheilaskaða, parkinson og sclerosu.

Til nr. 2

Landsstýrismaðurin er altíð sinnaður at samskipa útboðið við aðrar myndugleikar. Hetta krevur tó samstarv og er eisini upp til landsstýrismenninir í heilsumálum og mentamálum at verða við í.

Landsstýrismaðurin hevur áður greitt frá, at samskifti hevur verið millum landsstýrisfólkini í almannamálum og heilsumálum um møguligt samstarv og samskipan av viðgerðum og tænastum, sum ávikavist Almannaverkið og heilsuverkið veita borgarum, sum hava seinheilaskaða. Landsstýrisfólkini eru samd um, at tað er neyðugt at samstarva um borgarar, sum fáa seinheilaskaða um borgarin skal fáa nøktandi viðgerð og tænastur, samstundis sum tey avvarðandi kunnu hava eitt virkið lív.

Til nr. 3

Vantandi bústaðartilboð til borgarar, sum hava seinheilaskaða, hevur leingi verið og er framvegis ein stór avbjóðing.

Landsstýrismaðurin ásannar, at tað eru ov nógv fólk við seinheilaskaða, sum ikki fáa nøktandi bústaðartilboð.

Landsstýrismaðurin fegnast tí um, at broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunnin varð samtykt í Løgtinginum í mars. Við hesi lógarbroyting verða 200 milliónir settar av til serligar verkætlanir, tað kundi m.a. verið til bútilboð til fólk við seinheilaskaða og demens.

Til nr. 4

Almannaverkið samskiftir við kommunala geiran um tilboð á økinum, serliga um pláss til borgarar undir 67 ár. Almannaverkið roynir at fáa pláss til fólk í nærumhvørvinum, men eins og í Almannaverkinum mangla pláss í eldraøkjunum, og tí er tað sera trupult at útvega pláss til teir borgarar, sum Almannaverkið varðar av, í kommunalu tilboðunum.